Tíðindi úr Føroyum tann 20. november 2013

Tíðindi frá Kringvarpi Føroya samansett av Føroysku Sjómanskirkjuni/bjg

---

**Mesti vindurin er á Syðradali og í Mykinesi** 20.11.2013 - 05:31
Sambært veðurmátingunum hjá sjálvirkandi veðurstøðunum hjá Landsverk er mesti vindurin í løtuni á Syðradali har vindferðin er um 35 m/sek. Politiið hevur einans fingið skaðfráboðanir úr Gøtu.
- Vit hava ongar skaðafráboðanir fingið í nátt uttan at eitt buss skýlið var farið í Gøtudali. Og fyri stuttari løtu síðan fingu vit fráboðan um at ein ryggás hevði fingið skaða í Norðagøtu. So vindferðin hevur ikki verði so ógvuslig sum óttast var fyri, var sagt av politistøðini í Havn.
Nordlysid.fo

---

**Tá Sundaberg sakk" út í bók** 20.11.2013 - 07:26
Tað er klaksvíkingurin, Birgir Waag Høgnesen, sum í útvið 30 ár hevur búð í Vestmanna, sum gevur út bókina, um tá síðutrolarin, Sundaberg hjá Kjølbro sakk í 1972. Hon kann longu nú keypast á heimasíðuni www.ok.fo
Birgir sigur við Norðlýsið, at hann hevur leingi gingið við tankanum um at geva bókina út og gjørdi longu í 2005 samrøðu við skiparan á Sundabergi, Benna Joensen, um hendingina. Hendan samrøðan var gjørd, tá eg skrivaði um trolaran Kap Farvel.
Eg helt meg ikki verða tann rætta at skriva bókina, tí tað eru nógv skrivandi fólk í Klaksvík.
7. mai í fjør vóru tað 40 ár síðan hendingin fór fram. Eg lat 40 ára dagin fyri hendingina koma og fara, men har kom eingin bók frá nøkrum øðrum. Tað helt eg ikki at manningin, og serliga ikki Benni, hevði uppiborið, tí hetta er ein serlig hending í skipasøguni í Klaksvík, sigur Birgir.
- Í bókini havi eg fylgt skipinum frá tí tað varð bygt í Týskalandi 1952 til tað sakk í Ný Foundlandi í 1972, sigur Birgir, sum eisini hevur fylgt skipinum, frá tí at vestmenningar keyptu trolaran Nordhav 5 úr Norra í 1955 og góvu honum navnið Jóannes Fonsdal til teir mistu tað á tvingsilssølu tíggju ár seinni.
Hann leggur aftrat, at parturin um Jóannes Fonsdal er uppbygdur á tann hátt, at hann hevur gjørt nakrar beinleiðis samrøður við menn, sum hava siglt við trolaranum í tíðarskeiðnum, tá ið vestmenningar áttu Jóannes Fonsdal.
Eitt sindur gjørt burturúr, tá ið Kjølbro og aðrir bjóðaðu uppá Jóannes Fonsdal, men tað eydnaðist so at fáa hann til Klaksvíkar, har hann fekk navnið Sundaberg. Rithøvundurin sigur, at ryggurin í bókini er sjálvandi um, tá ið Sundaberg sakk.
- Eg havi lagt dent á, at tað ikki eri eg sum skrivi søguna, sigur Birgir, men at tað eru menn umborð, sum siga frá. Heilt nógvar samrøður eru við teir, sum vóru við lagnutúrin, við fólk, sum vóru við í bjargingini í illveðrinum 7. mai 1972 eins og við fleiri, ið varðaðu av.
Heilt nógvar myndir eru í bókini. Sum fæst á www.ok.fo
Norðlýsið hevur fingið loyvið at kaga í nøkur sitat úr bókini.
"Mamma var í mínum tonkum, og eg sá hana fyri mær ganga heima í túninum, og hønurnar gingu kring húsið hjá okkum. Eg var ungur, og tankarnir flugu um oyruni á mær, men tá ið eg hoyrdi flogfarið oman fyri okkum, føldi eg, at bjargingin var í nánd"
"Okkara ørindi vóru ikki at keypa bilar, nei, hann seldi finspritt. Dunkar, sum tóku 11 litrar. Benni kom við formaningum um ikki at drekka, men einki forboð"
"Eg sá, at Torleif Torgeirsson úr Klaksvík hevði ongan bjargingarvest. Eg hugsaði, at hann var giftur og átti børn, og eg átti ikki børn. Eg bað hann tí taka mítt belti, men eg segði einki um, hví eg ynskti tað. Tað merkisverda var, at tann einasti av allari manningini á Sundabergi, sum seinni veruliga fekk brúk fyri einum bjargingarbelti, tað var eg"
"So kemur útvarpið við tíðindunum um, at Sundaberg er sokkin og at øll manningin var bjargað. Tað var akkurát sum um ísur fór ígjøgnum meg. Eg frysti, og tað var líkasum at alt steðgaði upp. Men eg trúði ikki útvarpinum.

Nordlysid.fo

---

**Ov fá børn kenna barnarættindasáttmálan** 20.11.2013 - 09:36
20. november er altjóða barnarættindadagur. Hóast Føroyar skrivaðu undir sáttmálan í 1992, so liva vit enn ikki upp til allar ásetingarnar. Framstig eru tó at hóma, men tá tað snýr seg um at undirvísa børnum í barnarættindasáttmálanum er enn langt á mál.
Amnesty fegnast um, at føroysku myndugleikarnir hava tikið stig til at fylgja pørtum av tilmælunum frá ST. Tað hevur m.a. verið umrøtt at seta barnaumboð á stovn og fráboðanarskyldan er herd, men higartil hava vit ikki sæð nakra ítøkiliga ábending um, at politiski myndugleikin fer at útvega okkum hagtøl um t.d. kynsligan ágang, og stig eru heldur ikki tikin til at liva upp til áheitanina frá ST um, at øll børn í Føroyum skulu kenna síni rættindi, sum eru ásett í Barnarættindasáttmálanum.
Amnesty metir, at tað er orsøk at óttast, at føroysk børn ikki í nóg stóran mun kenna síni rættindi. Í apríl í ár ein starvsnæmingur hjá okkum eina lítla spurnarkanning, har 93 næmingar í 9. flokki vórðu spurdir um mannarættindi. Hóast hetta bert var ein lítil vegleiðandi kanning, vórðu vit bilsin av at staðfesta, at tað bert vóru 47 prosent av næmingunum sum vistu, at børn hava síni egnu rættindi. Sostatt visti meira enn helminingurin ikki, at børn hava serlig rættindi staðfest í barnarættindasáttmálanum. Av teimum 93 spurdu næmingunum høvdu 41 av teimum verið til undirvísing hjá Amnesty fyri einum-tveimum árum síðan. Millum teirra var talið á teimum, sum vistu, at børn hava síni egnu rættindi, munandi størri. Tað var 71 prosent.
Í samband við altjóða barnarættindadagin 20. november hevur Amnesty heitt á Bjørn Kalsø mentamálaráðharra um tryggja, at barnarættindasáttmálin í framtíðini gerst partur av lesiætlanum.
Amnesty hevur somuleiðis spurt, Bjørn Kalsø mentamálaráðharra, um ítøkilig stig eru ella verða tikin at liva upp til áheitanina frá ST, um at vit í Føroyum skulu vera betur til at upplýsa børnum um barnarættindasáttmálan.
Hetta vísti ST á í áheitanini til Føroyar í 2011:
·"At barnarættindasáttmálin eigur at vera partur av undirvísingarætlanini í øllum skúlum"
·"At øll, sum arbeiða við børnum, eiga javnan at fáa skeið og venjingar í barnarættindum"
Amnesty saknar eina yvirskipaða politiska viðger av tilmælunum frá ST. Tað er týdningarmikið, at politisk støða verður tikin til tilmælini, og at ein ætlan verður gjørd fyri, hvør hevur ábyrgd av ymisku tilmælunum, og nær ætlanin er at seta tilmælini í verk. Hetta verður eisini staðiliga heitt á Føroysku myndugleikarnar í viðmerkingunum frá ST í 2011.
Meðan vit her heima arbeiða fyri at betra um korini hjá føroyskum børnum, so eiga vit ikki at gloyma tey børn úti í heimi, hvørs rættindi verða skerd.
Í samband við barnarættindadagin og móttøku okkara í nýggju hølum hava vit endurprentað plakatina við Barnarættindasáttmálanum, soleiðis at øll áhugað, kunnu fáa eitt eintak.
Nordlysidfo

---

**Elsta sildin 15 ára gomul** 20.11.2013 - 09:47
Seinastu tíðina hava tíðindi gingið um, at sildin, sum nótaskipini hava fingið í føroyskum sjógvi í seinastuni hevur verið sera stór.
Tosað hevur verið um sildir, ið vigaðu um 500 gram og í hesum sambandi hevur onkur reist spurningin um hvussu gomul sildin gerðst, tí roknað verður vanliga við, at pelagiskur fiskur livir styttri enn eitt nú botnfiskur.
Vit vendu okkum tí til Havstovuna, har vit fingu svar frá Eydnu í Homrum, ið er útbúgvin havbiologur.
Eydna í Homrum ger vart við, at hon hevur ikki kannað t.d. munir millum økir og hedur ikki millum heyst- og várgýtandi sild, men hetta sum hon sigur okkum niðanfyri skuldi givið eitt fyrsta yvirlit.
Um øll sild, sum Havstovan hevur fingið í prøvum frá skipum og bátum síðani 2008, so sæst at elsta sildin er 15 ára gomul – men minni enn 5% eru eldri enn 10 ár.
Fyri prøvarnar frá skipum í 2012, var 7 og 8 ára gomul sild best umboðað (40% í alt). Vit eru ikki liðug at uppgera tilfarið fyri 2013. Í 2008 var tað 5 og 6 ára gomul sild,sum var best umboðað (47%).

Hetta avspeglar, sigur Eydna í Homrum, havfrøðingur, at tilgongdin til sildastovnin hevur verið vánalig síðani 2004. Tískil fiska vit í dag nógv eldri sild, enn vit gjørdu fyri nøkrum árum síðani.
Av tí, at vit ikki eru liðug at arbeiða tilfarið frá 2013, so síggi eg heldur ongar prøvar, frá hesi seinastu tíðini, har tú nevnir at sildin er sera stór. Tú nevnir sild, sum vigar 450 gr. Til tað er at siga at vit hava onkrar einstakar prøvar, har miðalvektirnar hava verið oman fyri 500 gram, so hetta er tó ikki eindømi, sigur Eydna í Homrum, havfrøðingur av Havstovuni.
Nordlysid.fo

---

**Jørgen bjartskygdur um tunnils ætlanirnar** 20.11.2013 - 10:28
- Í næstu viku vænti eg, at vit kalla andstøðuna inn á fund um tunnils ætlanirnar, soleiðis at vit fáa eina breiða semju.
Kári P. Højgaard spurdi í morgun í tinginum um, hvussu tunnilsmálið lá nú. Hann segði m.a. at bæði løgting og føroya fólk áttu krav uppá, at fáa kunning í málinum.
Jørgen Niclasen hevur tunnils málini undir sínum málsøkið. Hann helt í einum skemtiligum tóna, at tað var løgið, at júst Kári nú kravdi so stóran opinleika í málinum.
- Vit arbeiða við málinum og eg havi eina kenslu av, at vit eru nærri einari loysn. Ætlanin er at fáa alt løgtingið við, soleiðis at vit fáa eina breiða semju um hetta stórmál. Í næstu viku fari vit væntandi at tosa við andstøðuna. So eg bæði vóni og vænti, at ein loysn fyri tunnlarnir er komin áðrenn jól, segði Jørgen Niclasen í løgtinginum.
Nordlysid.fo

---

**CIP drámaleikur í Degi og Viku** 20.11.2013 - 10:51
Kringvarpið endurtók ósannindi í Degi og viku sum skuldi stuðla undir at løgmaður er ein lygnari og klipti tvey brot við Johan Dahl og Reimund Langaard uppí sendingina har tað skuldi ganga fram at hesir vóru í andstøðu til Løgmann
Vísandi til ein skrivligan fyrispurning hjá Kristinu Háfoss varð sagt í Degi og Viku gjárkvøldið at Løgmaður nú skal standa til svarts yvir fyri Føroya fólkið – og stóri spurningurin er um Løgmaður hevur logið.
Síðani var sagt at atfinningarnar móti løgmanni hava verið harðar seinastu tíðina – eisini í hansara egna flokki.
Síðani verður eitt innslag úr tinginum spælt har formaðurin í Tjóðveldi hellur gor og gall út yvir løgmann.
“Hetta er lygn oman á lygn omaná lygn – og eg má siga at eg trúgvi ikki einum orðið sum løgmaður sigur inni her, og eg skilji heldur ikki hvussu tingfólk kunnu sita her og trúgva tí sum hasin maðurin sigur….” segði Høgni Hoydal meðan hann peikaði.
Eftir brotið við formanninum í Tjóðveldi verður ljóðbrotið við løgmanni endur spælt har løgmaður vísandi til at hann umsitur ikki málsøkið sigur at hann ongan lut eigur í (Break free) avtaluni við CIP og ikki kundi funnið uppá at gjørt slíka avtalu.
Síðani kemur sjónvarpsmaðurin við eini beinleiðis lygn sum er fleiri ferðir endurtikin í Kringvarpinum:
“… løgmaður hevur eisini einsamallur fundast við CIP í tveir dagar á rað….”
Sjónvarpið veit at talan er um tveir fundir sum løgmaður tók stig til tá tað gjørdist greitt at politiskur meiriluti var ikki í samgonguni fyri ætlanini hjá landsstýrismanninum at geva privatum felag loyvið til at byggja og reka Skálafjarðatunnilin. Fyrri fundurin var ein kaffifundur sum vardi hálvan tíma ella trí kvarter og so var fundur dagin eftir í ein til tveir tímar har øll sum høvdu við málið at gera vóru við á fundinum.”
Síðani verður eitt video spælt har Johan Dahl siterar sjónvarpsmannin fyri at tosað um ein triðja fund sum hvørki hann ella nakar annar hevur fingið nakað at vita um og so verður hann spurdur um tað er óheppið – og Johan Dahl sigur við Føroya fólk at tað er óheppið at hann einkið hevur fingið at vita um hendan fundin, sum sjónvarpið júst hevur greitt honum frá – men sum í veruleikanum ongantíð hevur verið – men tað far Føroya fólk ongantíð at vita.

Í endanum av innslagnum verður sagt beinleiðis róð fram undir at partamaðurin hjá Løgmanni, Reimund Langaard, skal hava boða frá at hann kann ikki góðtaka at løgmaður sigur ósatt.
"… eg kann ikki liva við ella forsvara um tað er sagt ósatt tí at sjálvandi skulu øll ikki minst ein løgmaður siga sannleikan…."
Her verður sambandstingmaðurin brúktur sum ein mótpartur til støðu løgmans sum av Kringvarpinum longu er gjørdur til lygnara.
Niðurstøðan er at tað er grundaður mistanki um at Kringvarpið við at bera beinleiðis ósannindi og við ivasomum redaktionellum handalagið hevur sett sær fyri at lýsa Føroya løgmann sum lygnara.
Nordlysid.fo

---

**Elsebeth og Jákup: Sendi línubátar út á Føroya Banka!** 20.11.2013 - 11:53
Tinglimirnir hjá fólkaflokkinum vóru ikki í iva um, at línubátar áttu at sloppið á royndarveiðu úti á Føroya Banka fyri at finna útav, hvat veruliga støðan er har.
Elsebeth Mercedis Gunnleygsdóttur hevði munnligan fyrispurning í løgtinginum í morgun um, hví royndarveiða ikki verður gjørd við ymiskum reiðskapi á Føroya Banka. Jacob Vestergaaard svaraði, at yvirlitstrolingar vóru tað, sum Havstovan hevur mett geva røttu myndina og sum Havstovan ikki sær orsøk fyri at broyta. Sjálvur var hann tó ikki avvísandi fyri, at kanningar kundu gerast við øðrum reiðskapi enn troli.
Jákup Mikkelsen vísti á, at Magnus Heinason ongantíð hevði fingið fisk og tí var at senda línubátar út á Føroya Banka fyri at vísa á, um nakað skil var í trolingunum.
Elsebeth helt, at neyðugt var at fáa kunning um veruligu støðuna á Føroya Banka. Tí royndir siga, at ymiskur reiðskapur kann geva ymiskt úrslit. Edva Jacobsen vísti á tað sama og samanbar við støðuna á Flemish Kap fyrr í ár, tá trolarar einki fingu, meðan línubátar ikki hava havt betri fiskiskap.
Útfrá orðaskiftinum kundi man skilja tað sum, at línubátar í nærmastu framtíð sleppa at royndarveiða á Føroya Banka fyri at lýsa veruligu støðuna har, tí bæði í Fólkaflokkinum og Sambandsflokkinum tóktist tinglimirnir at ynskja hetta og einki beinleiðis mótmæli var.
Nordlysid.fo

---

**Fíggjarligt støðufesti selt bygningar fyri 400 mió.** 20.11.2013 - 12:24
Eginognin hjá Fíggjarligumstøðufesti er nú komin niður á 36 mia. Kr. Felagið hevur avrigga umleið 900 feløg og selt 141 bygningar, verður sagt í tíðindaskrivið
Kvartalsmeddelelse pr. 30. september 2013 for Finansiel Stabilitet
Finansiel Stabilitet fik et overskud på 24 mio. kr. i 3. kvartal 2013. For årets første tre kvartaler har Finansiel Stabilitet dermed et underskud på 169 mio. kr., som primært tilskrives udgifter til retssager samt værdiforringelser på ejendomme og pantebrevsbeholdningen.
Resultatet er primært knyttet til afviklingen af de banker, som blev overtaget under Bankpakken, inklusive Roskilde Bank, i perioden 2008-2010.
Finansiel Stabilitet har nedbragt den samlede koncernbalance med 13,5 mia. kr. til 36,5 mia. kr. i årets første tre kvartaler. Cirka 900 koncernkunder er afviklet – og der er således omkring 2.000 koncernkunder tilbage i Finansiel Stabilitet.
Der er afviklet udlån med likviditetseffekt for 7,0 mia. kr. og finansielle aktiver for 2,8 mia. kr., som blandt andet kan tilskrives frasalget af pantebrevsaktiviteten i sommeren 2013.
141 ejendomme er solgt for i alt 0,4 mia. kr. Efter kvartalets afslutning er der indgået to aftaler om salg af ejendomme i Finansiel Stabilitet for samlet 1,3 mia. kr.
Finansiel Stabilitet forventer fortsat, at resultatet for året 2013 vil indebære et underskud. Resultatet vil primært afhænge af udviklingen i aktiviteterne, som afvikles under Bankpakken.
Nordlysid.fo

---

**Fólkatalið í Føroyum vaksið við 114 seinasta árið** 20. Nov 2013
31. august 2013 var fólkatalið í Føroyum 48.151.
Í tólvmánaðar skeiðinum frá 1. september 2012 til 31. august 2013 var burðaravlopið 227 og nettoflytingin -113. Fólkatalið vaks sostatt við 114 fólkum.
Tað vísir feskasta uppgerðin hjá Hagstovuni.
Størsti fólkavøksturin var í Tórshavnarøkinum við 189 fólkum. Í Norðoyggjum og í Vágum vaks fólkatalið tilsamans við 11 fólkum. Í øllum hinum økjunum minkaði fólkatalið samanlagt við 86 fólkum. Størsta minkingin var í Eysturoy.
Orsøkin til fólkavøksturin er, at flytingin av landinum er minkað so mikið, at burðaravlopið í hesum síðsta tólvmánaðarskeiðinum var dupult so stórt sum nettoflytingin av landinum. Sí talvurnar niðanfyri.
Fleiri íbúgvahagtøl eru at finna í hagtalsgrunninum á www.hagstovan.fo
Antares.fo

---

**Russar seta strong krøv til føroyskan makrel** 20. Nov 2013
Føroysk uppsjóvarvirki royna í hesum døgum at selja vørur sínar á russiska marknaðinum, nú ES-marknaðurin er stongdur, men trupulleikar eru at sleppa av við vøruna, tí russar seta strong krøv.
Jenis av Rana, løgtingsmaður fyri Miðflokkin, reisti málið í tinginum, tá ófráboðaðir spurningar vóru fyrrapartin.
Johan Dahl, landsstýrismaður, svaraði, at hann og umboð fyri Heilsufrøðiligu Starvsstovuna vóru á russisku sendistovuni í Keypmannahavn fríggjadagin og løgdu málið fyri russiska sendiharran. Hann lovaði at viðgera málið.
Nógvur makrelur á goymslu
ES bannið hevur ikki havt onga ávirkan á goymslurnar í Føroyum.
Eitt leyst skot er, at eini 50.000 tons liggja á goymslu á teimum fýra goymslunum sum eru, og bannið hevur eisini koyrt nettoprísin eini 20 prosent niður.
- Vit hava fingið ein lægri sølupris og farmaprísurin er farin upp, so tað sum eftir er, er eini 20 prosent lægri.
Tað metir Eyðun Rasmussen, reiðari á Norðborg og Christian í Grótinum, í viðmerking til VP.
- Tað er ikki óvanligt at nakað er á goymslu hesa tíðina, men tá ið størsti marknaðurin ES er stongdur, so skapar tað forðingar allastaðni og í øllum liðum, sigur hann.
- Nýggjar rutur skulu finnast, nýggjar mannagongdir skipast, so hetta hevur givið sølufólkunum nógv stríð og strev, sigur Eyðun Rasmussen við VP.
Hann metir at goymslan hjá teimum er eini 5000 tons í løtuni. Í dag er tó eitt skip á Ánunum eftir 500 tonsum.
Antares.fo

---

**Neyvan heldur nøkur makrelsemja í hesum umfari** 20. Nov 2013
Líkt er ikki til, at nøkur semja spyrst burturúr makrelsamráðingunum heldur í hesum umfarinum.
Tað segði Jacob Vestergaard, landsstýrismaður í fiskivinnumálum, við kringvarpið á middegi.
Hann segði, at dagurin í dag fer at vísa, um nøkur avtala verður gjørd millum strandarlondini hesa ferð ella ikki.
Øll vikan er annars sett av til samráðingar, men sum skilst er okkurt komið upp í samráðingunum, sum møguliga krevur, at neyðugt verður við einum samráðingarumfari aftrat,
Samráðingarnar nú fara fram í írska býnum Clonakilty (myndin) og byrjaðu seinnapartin mánadagin.
Hetta er aðru ferð, partarnir hittast, síðani teir hittust fyrstu ferð í London í oktober.
Norski fiskimálaráðharrin, Elisabeth Aspaker, hevur fyrr sagt, at hon vónar og væntar, at partarnir koma ásamt um eina nýggja avtalu fyri jól.
Sostatt kann roknast við, at samráðingarnar halda fram í desember, spyrst ongin avtala burturúr í dag.

Antares.fo

---

| Føroysk partabrøv | Last | +/- | % |
| --- | --- | --- | --- |
| Atlantic Airways (ICL) | 164,50 | 0,00 | 0,00 |
| Atlantic Airways (COP) | 147,00 | 0,00 | 0,00 |
| Atlantic Petroleum (ICL) | 145,00 | 0,00 | 0,00 |
| Atlantic Petroleum (COP) | 141,50 | 1,50 | 1,07 |
| Bakkafrost (OSL) | 77,64 | 0,00 | 0,00 |
| BankNordik (ICL) | 130,00 | 0,00 | 0,00 |
| BankNordik (COP) | 130,50 | -0,50 | -0,38 |
| Faroe Petroleum (LSE) | 11,12 | -0,38 | -3,30 |

Vmf.fo

---

**Andlát**

Elisa Dam, Kvívík andaðist týsdagin, 90 ára gomul.

Hans Johannes Hendriksen, Skúvoy andaðist á Landssjúkrahúsinum týsmorgunin, 83 ára gamal.

---